# Kring jørðina í tríggjar tímar

**Stóra mentunartiltakið á Læraraskúlanum leygarkvøldið gav eina góða kenslu av tí fjølbroytni, sum finst innan mentan úti í heimi og her heima hjá okkum. Í samfullar tríggjar tímar bergtóku umboð fyri 10 lond ta stóru áhoyrarafjøldina við nøkrum av tí, sum sermerkir teirra land**

ALTJÓÐAGERÐING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Trummudansur úr Gambia við "føroyskari" luttøku hugtók áhoyrararnar*

**Útlendsk mentan:** - Hey! Over here. Come and try my soup!

Við eitt borð stendur ein kvinna úr Ghana, og hon hevur eitt uppá hjarta: At fólk mugu koma til hana fyri at royna tann góða matin, hon hevur gjørt úr heimlandi sínum.

Til dagin hevur hon latið seg í tey fínu klæðini, sum hon var von at ganga við í heimlandi sínum. Og nú eitt altjóða mentanartiltak er á skránni í Føroyum, hevur hon sjálvandi tikið tey framaftur til høvið.

Undir liðini á henni stendur ein onnur kona í somu ørindum. Hon er úr Togo, og hevur eisini gjørt ein rætt til, sum er væl dámdur í hennara landi. Ein part av tilfarinum til góðu sósina hevði hon bílagt sær úr Danmark.

Á hinum borðunum er somuleiðis høvi at royna mat úr eini 10 londum kring allan heimin, ja, sjálvt flatbrøð og spekemat úr Noregi.

Henda væl fyrireikaða og sera fjølbroytta buffetin var ein partur av tí stóra altjóða mentanartiltakinum, sum var um vikuskiftið. Her settu umboð fyri eystur og vestur sín serliga dám á, við framførslum og eini uppliving av nøkrum av tí, sum rørir seg í mentanini í heimlandinum.

Hetta var fyrstu ferð, at ein fyrireikaði eitt slíkt tiltak. Men óhugsandi er ikki, at tað verður endurtikið eina aðru ferð.

### Karneval

Stóra tiltakið byrjaði fríggjakvøldið, tá umboð fyri fimm ymisk lond vístu fram nakað av tí, sum sermerkti teirra heimland.

Her varð vístur norskur fólkatónleikur og japanskur floytutónleikur, og síðani var Ongland á palli við einum innslagi við tradisjonellum aboriginal ljóðføri úr Australia.

Eftir hetta vóru tradisjonellir dansir framførdur úr Gambia, Nigeria og Ghana, áðrenn tveir klassiskir sangir úr Brasilia og eitt innslag úr einum karnevali varð framført.

Hetta kvøldið var líkasum ein upphiting til størra tiltakið leygarkvøldið, har áhoyrararnir í teirri tríggja tíma longu framførsluni fingu leitt áhoyrararnar á eina áhugaverda og hugtakandi mentanarferð kring allan heimin.

### Serstøk harpa

Fyrsta innslagið áttu føroyingar. Her varð frá almennari síðu boðið vælkomið, áðrenn Kári Sverrisson fór á pall og framførdi eitt skjaldur við guitara og síðani sang eitt kingo-lag, hann hevði lært av Sandoynni.

Russar komu síðani á pall við dansi og sangi, áðrenn thailendingar vístu fram ein dans, sum hugtók áhoyrarafjøldina almikið.

Innsløgini um kvøldið fluttu seg longur og longur eystureftir, og nú átti Japan tørn. Her vísti unga Aki Tamura sítt ótrúliga kynstur á eini serstakari harpu, sum hon hevði fingið til landið tveir dagar undan framførsluni. Tað var ikki sørt, at fingrafima spæl hennara hugtók øll í teirri fullsettu Læraraskúlahøllini.

USA var umboðað av eini føroyskt giftari kvinnu, sum sang tveir sangir hagani. Eftir at hava givið eina stutta frágreiðing um sangina, sang hon ikki óvæntað kenda sálmin Amacing Grace.

Síðani var ein matsteðgur, har fólk fingu høvið at royna nakað av matkynstrinum úr teimum luttakandi londunum.

### Skuggadansur

Eftir steðgin, sum vardi væl longri enn mett, tí fólk vóru so áhugað í útlendsku rættunum, legði Noreg fyri við fólkatónleiki og dansi, áðrenn dansur og trummur úr Nigeria og Gambia fingu sett áhoyrarafjøldina í gongd aftur.

Hesa løtuna livdi høllin rættiliga við í rútmunum, men varð so løtu seinni sitandi pinnastill og bergtikin, meðan tvær ungar kvinnur, saman við australskum ljóðføri framførdu ein skuggadans. Ikki eitt ljóð hoyrdist undir framførsluni, men tess harðari vóru lógvabrestirnir tá henda hugtakandi framførslan var at enda komin.

Latínamerikanskar rútmur áttu næstu løtuna, áðrenn alt tiltakið endaði við at allir luttakararnir komu fram á pallin og takkaðu soleiðis fyri seg.



*Í steðginum var høvi at royna mat úr ymiskum londum. Henda vælklædda kvinnan úr Ghana bjóða fram góða suppu úr heimlandinum*

### Kinesiskt uppboð gav 2000 kr.

Grunnur: Ætlanin við stóra mentunartiltakinum var eisini at fáa settan á stovn ein grunn til frama fyri altjóða mentanarligt samstarv í Føroyum.

Ein slíkur grunnur krevur sjálvandi pening, og tí varð á tiltakinum eisini savnað inn til hetta endamálið.

Hetta varð gjørt á ein heldur óvanligan hátt í okkara høpi, nevniliga eftir kinesiskari uppskrift.

Hjá okkum er vanligt, at tann ið eigur hægsta boðið fær lutin, sum er til sølu. Men í Kina er tað ikki tann við tí hægsta boðnum, sum fær lutin, men tann ið heldur longst á, og sum at enda eigur tað seinasta boðið.

Í høvuðsheitum kann ein t.d. bjóða 500 kr., men hevur tú seinasta boðið áljóðandi 5 kr., so fært tú lutin. Einasta treytin er, at tú rindar fyri títt seinasta boð.

Hetta varð roynt í Læraraskúlahøllini, og tóktist hetta at hava stóran áhuga millum fólkið. Tað stóð ikki á, at fáa fólk at bjóða uppá ta vakra listarverkið, sum stóð uppá spæl.

Tá avtornaði vísti tað seg, at fyrsta innskotið í henda nýggja grunnin ljóðaði uppá 2000 kr., sum savnaðar vórðu saman á Læraraskúlanum leygarkvøldið 4. juni 2005.